## Tey ríku fingu lætta

Skattalættarnir, sum danska stjórnin hevur sett í verk síðani 2001, hava givið teimum ríku 15 ferðir størri ágóða enn teimum fátækastu. Tað slrivar Ugebrevet A4 í dag og vísir til útrokningar, sum vinnuráðið hjá verkamannafeløgunum hevur gjørt. Tey trý skattatiltøkini, sum komu í 2001, 2004 og í 2007, hava givið teimum best løntu 20.500 krónur í lætta um árið, meðan tey lægst løntu hava fingið 1.400 krónur árliga burtur úr tiltøkunum.



## Húsarhaldsskúli sýnir fram

Í sambandi við at skeiðið á Húsarhaldsskúla Føroya er liðugt, skipa næmingarnir á skúlanum fyri stórari framsýning av handaligum arbeiði. Skeiðið er longt við seks vikum, og tí er framsýningin í ár størri og fjølbroyttari enn vanligt. Undirvíst hevur verið í binding, tilskering, seyming, leður og skinn, patchwork, silkimáling, brodering og føroysk bond. Sum nakað nýtt verður opið hús á skúlanum, har vitjandi - kanska serliga komandi næmingar og foreldur teirra - kunnu fáa meira at vita um skúlan. Framsýningin er opin týsdagin 19. februar frá klokkan 16 til 21. Kaffi og køkur verða at fáa undir framsýningini.



*Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, og Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður, á tíðindafundi í bankanum í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Føroya Banki 180 milliónir í avlopi

**Avlopið hjá Føroya Banka í 2007 var 180 mió. kr. Eftir skatt var úrslitið 144 mió. kr. Av avlopinum rindar Føroya Banki 45 mió. kr. í vinningsbýti til partaeigararnar. Í 2006 var avlopið 193 mió. kr. áðrenn skatt**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Netto rentu- og tænastuinntøkurnar øktust úr 275 milliónum krónum í 2006 upp í 339 milliónum krónum í 2007 svarandi til ein vøkstur upp á 23 prosent. Kursvinningurin hjá bankanum tífaldaðist úr 7 milliónum krónum í 2006 upp í 23 milliónum krónum í 2007.

Útlánini í Føroya Banka við árslok í 2007 vóru 7,5 milliardir krónum. Økingin samanborið við 2006 var 2,1 milliard ella 39 prosent. Innlánini í 2007 vóru 5,5 milliardir samanborið við 4,6 milliardir krónur í 2006. Økingin var 17 prosent.

Starvsfólka- og umsitingarútreiðslurnar øktust úr 154 upp í 206 milliónir krónur. Ein stór øking stóðst av dótturbankanum undir stovnan í Danmark. Aðrar økingar stóðust av, at fleiri fólk vórðu sett í starv, at lønirnar hækkaðu, og at bankin hevði munandi útreiðslur av børsskrásetingini og samleikaskiftinum í 2007.

Samanlagda úrslitið í 2007 á 180 milliónir krónur var eitt vet lakari enn í 2006, tá avlopið var 193 milliónir krónur. Hetta komst av, at munandi færri afturføringar av burturleggingum vóru í 2007.

Rentingin av eginognini í 2007 var 11,1 prosent samanborið við 13,7 prosent í 2006.

Eginpeningurin í Føroya Banka eftir vinningsbýtið á 45 milliónir krónur er 1.345 milliónir krónur. Við árslok í 2006 var eginpeningurin 1.246 milliónir krónur. Solvensurin er nú 17,9 prosent samanborið við 23,8 prosent í 2006.

Fíggjarjavnin í Føroya Banka er nú 9,6 milliardir krónur samanborið við 7,2 milliardir krónur í 2006. Fíggjarjavnin er øktur 33 prosent.

### Fyrstur á børsin

Farna árið var søguligt hjá Føroya Banka. Tann 21. juni 2007 varð Føroya Banki sum fyrsti føroyski bankin nakrantíð skrásettur á virðisbrævamarknaði. Talan var um eina tvískráseting á børsunum í Reykjavík og Keypmannahavn. Partabrøvini vórðu seld fyri 189 krónur stykkið.

Børsskrásetingin hevði við sær, at bankin fekk yvir 15.000 nýggjar partaeigarar og nú støðugt verður virðismettur á børsunum. Hægsti kursur hjá Føroya Banka higartil hevur verið 264 og lægsti kursur 126. Kursurin lækkaði nógv í heyst, tá avleiðingarnar av fíggjarkreppuni í USA breiddu seg til Evropa og settu bankakursir sum heild undir trýst.

Fyri at tillaga seg nýggju tíðina skifti Føroya Banki samleika stutt undan børsskrásetingini. Nýggi samleikin ímyndar ein nýmótans klassikara á veg framá.

### Dótturbanki á veg

Annan ársfjórðing í 2008 letur Føroya Banki upp nýggjan banka í Danmark, Føroya Bank A/S. Leiðslan í bankanum er sett, og arbeitt verður í løtuni við at fáa seinastu fyrireikingarnar upp á pláss. Tilsamans umleið 20 starvsfólk fara væntandi at arbeiða í nýggja bankanum.

Dótturbankin í Danmark fer serliga at taka sær av ognarrøkt fyri múgvandi kundar og verkætlanarfígging.

### Útlit fyri 2008

Føroya Banki væntar eitt ársúrlit í 2008 fyri skatt á millum 165 og 185 milliónir krónur.

Netto rentuinntøkurnar fara væntandi at økjast 8-14 prosent orsakað av vøkstri í útlánum. Sami vøkstur í prosentum er væntandi í tænastu- og provisiónsinntøkunum.

Starvsfólka- og umsitingarútreiðslurnar økjast væntandi millum 0 og 5 prosent orsakað av virkseminum í Danmark.

Vøksturin í útlánum og innlánum verður væntandi millum 5 og 10 prosent í 2008 svarandi til væntaða búskaparvøksturin